# Bilar

**Magnus Gunnarsson**
*maggi@sosialurin.fo*






# ELEKTRISKUR HÝRUV




*Ein modernaður London Taxi við plássi til viðførið høgrumegin framman*

## Volkswagen frumsýndu herfyri konseptbilin VW Milano, sum er ein elektriskur hýruvognur, ið koyrir 300 km upp á eina løðing

Konseptbilurin VW Milano Taxi Concept er ein sensatión í bilheiminum, við tað at hann er bygdur eftir sama konsepti sum teir kendu London Taxi men í modernaðum stíli við 116 hk elmotori.

Bilurin er lakkeraður í sama liti sum hýruvognarnir í Milano, grønur og svartur. Hugskotið við bilinum er, at hann skal kunna fáast í teimum litunum, sum eyðkenna hýruvognarnar í teimum ymisku býunum kring um í heiminum sum t.d. Berlin, New York, Beijing, Cape Town, London, Moskva ella Tokyo.

VW Milano hevur elmotor við 116 hk og koyrir 300 km upp á eina løðing. Batteríini eru í botninum á bilinum. Hann hevur síðuhurð høgrumegin aftan og er sera lættur at koma inn og út úr. Pláss er til viðførið við síðuna av bilføraranum framman eins og í teimum kendu London Taxi.